

# Goymslustørv á Skipasmiðjuni

Á goymslu okkara í Tórshavn eru hesi størv leys at søkja:

**Amboðsgoymslan**
Tann, ið settur verður, fær høvuðsábyrgd av Amboðsgoymsluni, sum í høvuðsheitum fevnir um:

- At halda gott skil á amboðunum og á Amboðsgoymsluni sum heild
- At keypa og viðlíkahalda amboð

Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi er røkin og nærlagdur. Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur útbúgving innan maskinfakið. Teldukunnleiki á brúkarastigi er eisini ein fyrimunur.

**Elektrikari**
Tann, ið verður settur, fær ábyrgd av el-partinum á goymsluni. Hetta fevnir í høvuðsheitum um at avgreiða viðskiftafólk og um keyp og skráseting av innkomnum vørum. Eisini er nógv samskifti við skip um serligar eykalutir.

Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur royndir frá goymsluarbeiði og sølu. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi er røkin og nærlagdur og er sinnaður at arbeiða í vaktum.

Høvuðsgoymslan á Skipasmiðjuni fevnir um sølu av mekaniskum eykalutum, el-lutum og skipsútgerð. Har starvast 9 fólk.

**Umsókn og fyrispurningar**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Postsmoga 65
110 Tórshavn

Att.: Hans Jacob Poulsen

í seinasta lagi 9. januar 2006.

Fyrispurningar um starvið í Amboðsgoymsluni kunnu setast til Mouritz Mohr á telefon 30 11 00 ella 50 11 30.

Fyrispurningar um starvið sum elektrikari á Goymsluni kunnu setast til Boga Kirke á telefon 30 11 00 ella 50 11 11.

*Á P/F Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 260 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

SKIPASMIÐJAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Miðfyristingin

Í miðfyrisitingini eru hesar deildir:

Roknskapardeildin, herundir bókhald, kassi og líkningareftirlit Snarskiva, KT-deild, Starvsfólka- og lønardeild Skattakærufyrisiting

Vinnusamskiparin fer at starvast í ráðhúsinum har m.a. borgarstjórin og kommunustjórin húsast.

Í miðfyrisitingini starvast í løtuni 45 fólk, í ymiskum hølum í miðbýnum.

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Vinnusamskipari til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommunu søkir eftir vinnusamskipara. Vinnusamskiparin skal lýsa vinnulívið í kommununi sum heild og útgreina hvørji átøk, Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna vinnuna í kommununi og skapa betri karmar. Starvið er nýtt, og viðkomandi verður tí við til at laga starvið til.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.**
- At lýsa vinnuna í Tórshavnar kommunu og meta um, hvørji átøk kommunan kann gera til tess at menna vinnuna sum heild.
- Útgreina hvat Tórshavnar kommuna kann gera fyri at menna ferðavinnuna í kommununi.
- At orða vinnustrategi og handlingsætlanir fyri Tórshavnar kommunu.
- Vera við til at lýsa og kunna um tær tænastur, sum Tórshavnar kommuna kann bjóða vinnuni.
- Ráðgeva vinnuni um hvørjir møguleikar eru í Tórshavnar kommunu.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tú dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og enskum, er framsíggin, framsøkin og fær úrslit. Útbúgvingarstøðið er ikki avgerandi, men telur við í heildarmyndini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sum skjótast. Starvið verður sett sambært viðkomandi sáttmála og er verkætlanarsett fyri tvey ár (2006-2007).

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. januar 2006 kl. 16.00. Viðmerkið umsóknina "Vinnusamskipari".


## TIL SØLU

- SCANIA 113
- HIAB 190 krani v. fjarstýring
- HIAB 1165 krani
- VOLVO LM1240 gravmask.
- Mafiavognur
- Isolera bingja 20 fót
- Bingja 8 fót
- Glasfibur jollur
- Sandblásianlegg
- Planeringsskuffir til 25T maskinur
- Skuffa til gravimask.
- Hydraulik polygrabbi til gravmask.
- Hydralulik flatgrabbi til gravmask.

**Telefon 59 59 00**

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

# GSM telefonir &

**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**

Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

# Lesið Sosialin